VÍF-Neistin 22-34 (12-16):

# Greiður Neistasigur

**Kvinnurnar hjá Neistanum eru nú næst ovastar í deildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Mikukvøldið leiktu kvinnuliðini hjá VÍF og Neistanum. Í mun til mansdystin millum somu feløg, so var ikki nakar serligur spenningur í hesum dystinum.

VÍF hevur eftir fleiri góð nú sett sær fyri at byggja eitt mest sum nýtt lið upp, og tað sæst eisini aftur í úrslitunum, sum ikki hava borgað fyri nøkrum heiðursmerkjum í ár.

Hjá Neistanum tykist støðan hinvegin vera tann, at tær í ár vilja hava heiðursmerki burtur úr árinum, og mikukvøldið var so eingin slingur í valsinum.

Longu tíðliga í dystinum byrjaði Neistin at toga frá. Kanska ikki so ógvusliga, men í einum longum og seigum trekki fóru tær alsamt longur frá mótstøðuni. Serliga eftir steðgin fór at dragna, og tá saman um kom, so kundi neyvan nakar í høllini seta ein fingur á sigurin, sum altso tók Neistan upp á næst ovasta sessin í deildini.

### Fakta um dystin

**VÍF-Neistin 22-34 (12-16)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Ioana Rápa 11(4), Kirstin Helgadóttir 2(1), Linda Johannesen 2, Sára Jógvansdóttir 2, Manuela Stan 1, Eyðritt Andreasen 1, Alis Høghamar 1, Tórunn Jónolvsdóttir 1
**Neistin:** Simona Petersen 11(5), Marjun Tróndarson 5(2), Ása Dam á Neystabø 5(1), Lív Sørensen 4, Annika Thomsen 4, Kára á Dunga 3, Unn Kragesteen 2
**Brotskøst:** VÍF 7, Neistin 10
**Útvísingar:** VÍF 2, Neistin 1
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen



*Ingi Olsen á Áki Mørk áttu høvuðsleiklutirnar seinastu spennandi løtuna, tá VÍF enn einaferð togaði ein tepran sigur heim*

*savnsmynd*

VÍF-Neistin 33-32 (19-19):

# Eitt mál er nokk!

**Neistin misnýtti sínar møguleikar, tá teir høvdu kjansin at taka tvey týðandi stig í Vestmanna, og so vann oddaliðið aftur ein eitt-máls sigur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, Neistamenn iðraðu seg eftir dystin móti VÍF mikudagin. Bara átta sekund fyri leiklok høvdu teir annars møguleikan at avgera alt. Áki Mørk fintaði seg leysan, men hann misnýtti møguleikan, og so kundi VÍF kontra. Agnar Joensen streyk avstað. Spældi Inga Olsen blankan, og so stóð 33-32 á talvuni við einum sekundi eftir at spæla.

### Tóku ikki av

Somikið stórur var spenningurin í Vestmanna hesa seinastu løtuna, og sum heild var talan alla tíðina um ein javnan dyst. Kanska var spælið ikki av tí besta, men dramatikkurin og nervin helt sær alla tíðina.

Hjá VÍF vóru nakrar broytingar gjørdar á liðnum. Áki Olsen, sum tó eisini var við ímóti Kyndli herfyri, fekk nú nakað meira av spælitíð á bakkinum, soleiðis at hann kundi avlasta stórabeiggjan, og eisini John Zachariassen var nú aftur at síggja, eftir skaðasteðg.

Tað gekst tó striltið at sleppa frá Neistanum. Ikki minst tí Jota í bláa málinum stóð seg hampuliga væl í fyrra hálvleiki, har hann fleiri ferðir steðgaði vestmenningum í góðum skotstøðum.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki var tó um reppið, at alt skrædnaði. VÍF smekkaði trý mál á rað inn, men Neistin fekk svarað aftur, og so gekk tað seigliga fram móti dystarenda. Seinasta korterið ella so vóru tað gestirnir, sum tóktust hava munin, men frá vestmenningunum sluppu teir ikki. Eitt mál á muni, javnleikur, eitt mál á muni…

Og so vórðu tað sum sagt at enda vestmenningarnir, sum sluppu at avgera, men tað var so ikki uttan drama. Sum nevnt, so hevði Áki Mørk gyltan møguleika fá sekund fyri hesum, og við støðuni 31-31 hevði sami leikari møguleika við brotskasti. Sum ikki einaferð, so fekk Dejan Lacok tó vart fyri hesum, og so slapp VÍF framum. Neistin javnaði til 32-32, og tá VÍF so eftirfylgjandi brendi, kundu teir bláu tikið stigini, men tað varð so av ongum.

### Minimalisma

Og so er VÍF aftur oddalið. Átta stig fyri fimm dystir er so avgjørt góðkend úrtøka, og einki er at ivast í, at tey í Vestmanna er væl nøgd um hetta. Ikki minst tí liðið væntandi verður væl sterkari í bæði verju og álopi, tá Sámal Joensen aftur fær spælt.

Onkur vil kanska siga, at sigrarnir hava verið lítið sannførandi, og tað sæst so eisini aftur á talvuni, har málmunurin enn er negativur. Men tað leggja vestmenningar helst líka í. Og sum ein klókur maður einaferð hevur sagt. »Skjýtur tú eitt mál meira enn mótstøðuliðið í hvørjum dysti, so verður tú heilt víst meistari!«.

### Fakta um dystin

**VÍF-Neistin 33-32 (19-19)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Ingi Olsen 11(4), Áki Olsen 5, John Zachariassen 5, Áki G. Olsen 5, Agnar Joensen 4, Harald Bjørgvin 1, Daniel Rápa 1, Jákup S. Andreasen 1
**Neistin:** Áki Mørk 11(3), Dann Thorleifsson 7, Helgi Michelsen 3, Blagoje Buha 3, Ræni Slættanes 3, Damir Oros 3, Ólavur Brimnes 2
**Brotskøst:** VÍF 4, Neistin 5
**Útvísingar:** VÍF 2, Neistin 1
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen.

# Greitt brot á ítróttarandan

**Kappingarnevndin hjá FSF fer á fundi hóskvøldið at viðgera ítróttarliga framferðarháttin hjá MB**

MB
*Jákup Mørk*



*Persónliga sigur Bjarki Mohr seg vera hart ímóti háttinum, sum MB fyrireikaði seg til dystin móti SÍF uppá*

Flestu áskoðararnir kring vøllin í Sandavági mikukvøldið mundu vera av teirri greiðu fatan, at hetta var at fara út um mark. At nýta leikarar, sum heilt greitt ikki høvdu loyvi at spæla, fyri onkursvegna at manifestera antin eina provokatión ella eina maktstøðu, soleiðis sum hon einaferð var, tá MB var sterkasta liðið í Vágoynni.

Tað kann helst vera ymiskt, sum liggur sum grund fyri framferðini hjá MB til dystin, men sæð úr einum ítróttarligum sjónarhorni er helst einki, sum kann forsvara slíkan atburð.

Føroysku kappingarreglurnar fyri fótbólt innihalda ikki nakað serligt perri um tað, sum danir rópa »at brnge spillet i miskredit«. Einki er at ivast í, at ein slík hending í eitt nú Danmark hevði sortera undir slíkar reglur, men heilt á berum stendur kappingarnevndin hjá FSF tó ikki.

Reglurnar siga nevnliga greitt, at FSF kann av sínum eintingum taka mál upp til viðgerðar, og at revsingin væl kann vera onnur, enn bara tað at tapa við 0-0.

Og stendur tað til formannin í kappingarnevndini, Bjarka Mohr, so skal MB heldur ikki sleppa óátalað frá hendingini.

– Nú fái eg sjálvandi ikki tala fyri kappingarnevndina sum so, men persónliga haldi eg, at hetta er farið langt út um mark. Hetta er heilt greitt ímóti reglunum, sum eru galdandi, og hetta er heilt greitt ímóti ítróttarandanum. Og tað eigur so ikki at fara framvið uttan víðari, staðfestir Bjarki Mohr.

Víðari sigur hann, at kappingarnevndin skal í øðrum sambandi hava fund hóskvøldið, og at málið uttan iva verður tikið upp á hesum fundi. Hvør avgerðin her verður, fær formaðurin ikki sagt, men møguleikarnir eru fleiri. Eitt nú at geva felagnum bót, ella at koyra tað úr kappingini. Bróðurparturin av áskoðarunum mikuvkvøldið munnu í øllum førum halda, at bæði hesi alternativini høvdu verið hóskandi.

### FAKTA

**Grein 38,** stk 3 í kappingarreglunum fyri fótbólt:
F.S.F. kann eisini í serligum førum sjálvt taka eitt mál til viðgerðar, um illgruni er um, at eitt ávíst felag hevur framt brot á hesar reglur. F.S.F. skal tá geva felagnum boð um hetta, áðrenn nøkur avgerð verður tikin.

**Grein 39 í somu reglum**
Brot á hesar kappingarreglur verða viðgjørd av Kappingarnevndini, sum kann gera úrskurð um, at felag, ið hevur framt brot á hesar reglur, skal revsast við:

- ávaring
- bót
- at tapa dyst
- at felagið verður dømt at missa heimavøll í ein ella fleiri dystir
- at felagið verður koyrt úr kappingini



## VIÐMERKINGAR

# Vinnustykki til leigu ella til keyps

**Annfinn Brekkstein**
*valevni fyri Sambandsflokkin til býráðsvali*



VAL04

Tað skal vera møguligt hjá smáídnaðinum at vera við.

Nú Skarðshjalli er um at vera liðugur, og ídnaðarastykkini verða seld vinnuni, skuldi tað verið ein møguleiki hjá smáídnaðinum at fingið sín tørv nøktaðan. Her hugi eg um møguleikan at leiga ella keypt eitt vinnustykki upp á umleið 500 fermetrar.

Tað eru fleiri smáfyritøkur sum ikki hava møguleika at keypa stór ídnaðarstykki og harvið bjóða ímóti teimum stóru og væl etableraðu vinnufyritøkunum í býnum. Her vildi eg meint, at kommunan skuldi borið so í bandi, at smáfyritøkur – tað veri seg smá-entreprenørar, lastbilaeigarar, busseigarar og maskineigarar – fingu annaðhvørt til keyps ella leigu eitt stykki, sum hóskar teirra tørvi.

Hesar fyritøkur hava ongastaðni at vera og kunnu ikki seta síni amboð nakrastaðni – so sum bilar og maskinur – við tí úrsliti, at lastbilar, bussar og entrenøramboð standa, har tað ikki er loyvt.

Hesin møguleiki at fingið eitt stykki, er ein hjálp til vinnuna og samstundis ein fyrimunur fyri kommununa, tí tá fáa vit skipað viðurskifti á hesum øki, ið gagnar bæði vinnuni og borgarunum.

Tað eru ikki allar vinnufyritøkur, ið hava fíggjarligt grundarlag fyri at keypa stór ídnaðarstykki, og tí skal tað verða ein møguleiki at leiga stykki til endamálið.

Vit hava eina vælvirkandi kommunala fyrisiting í Tórshavnar kommunu, sum hevur fullan førleika til at umsita leigustykki og harvið seta rímuligar treytir og krøv til leigustykkini.

Hesum vil eg sum valevni virka fyri!

# Valið í Nes kommunu

**Súni í Hjøllum**



VAL04

Sum bygdaráðslimur í Nes kommunu ert tú við til at umsita skattgjaldarans pening, sum í løtuni er 27 mió. kr árliga. Hetta er ein stór ábyrgd, men samstundis ein sera spennandi uppgáva, tá ið tú ynskir framburð og menning fyri bygdirnar á Nesi, Toftum og í Saltnesi.

Verður mær víst álit á valdegnum, fari eg framhaldandi at virka fyri at skapa góðar karmar fyri vinnuligum og arbeiðsskapandi virksemi, sum so aftur ger tað møguligt at loysa mong og stór mál, ið liggja fyri framman. Mál, sum hava sum stavnhald at betra um trivnaðin fyri øll í Nes kommunu — ung sum eldri.

# Grundstykki til øll

**Sámal í Gong**
*Valevni á lista H til býráðsvalið*



VAL04

Verandi samgonga hevur við danskari ráðgeving staðið fyri at leggja allan Hoyvíkshagan út til bygging uttan fyrilit fyri bóndagarðsbrúkinum. Ein útstykking í ovurstórari vídd, har trupult er at fáa eyga á hvør samanhangur er í útbyggingini og hvussu býarparturin er skipaður við teim funktiónum, ið hartil hoyra. Um bústaðarøkið nakrantíð verður annað enn ein sovibýur kann ivast stórliga í. Eru øki løgd út til handil og ídnað, mentanarøki, spælipláss og frítíðarøki, heilsubótarstøð og annað ?

Tá danskir ráðgevar skulu siga býráðnum hvussu farast skal fram, kann framtíðar menning ikki blíva annað enn eitt danskt bústaðarmynstur.

Føroyskt lendi er annarleiðis háttað enn tað danska, og búsetingarmynstrið er eisini annarleiðis – sjálvt um hetta undir fleiri ára útlendskari ávirkan er vorið meiri og minni gelt.

Onnur øki – stór og smá - finnast kring um í Tórshavnar kommunu, og væl ber til at leggja út til øll samfelagsins endamál uttan at skapa deyð og einkisigandi búpláss.

Setið krossin við meg týsdagin, og tit skulu verða vís í, at annað skil skal koma í ta óskipaðu og sera vánaligt stýrdu býarplanlegging, ið verandi samgonga hevur staðið fyri. Allir borgarar skulu innan 4 mánaðir fáa tillutað grundøki – ikki bara í haganum í Hoyvík, men allar staðir har byggiøki kunnu leggjast út.

# Tvøroyrar kommuna og vinnulívi

**Finnleif Guttesen**
*býráðslimur og valevni*



VAL04

Nógv er sagt um Tvøroyrar kommunu, og hvussu hon hevur stuðla vinnulívi í farnum tíðum.

Tað er ikki bert skuld komin burturúr, at kommunan hevur stuðla vinnulívinum á Tvøroyri, tað mugu vit øll viðurkenna.

Vit kunnu øll verða bakklóg og siga, at hatta og hatta var høpisleyst at stuðla, men vóru orsøkirnar til stuðulin, at varðveita **arbeiðspláss** og ikki **kenningarpolitikkur**, so er væl ikki so nógv at finnast at, og vónandi hevur man lært av feilunum.

**Kommunan kann stuðla**
Nú tíðirnar sýnast at blíva eitt sindur verri, kann kommunan eisini stuðla uppá ymiskan máta, t.d:

- Sum nú í summar, har ungfólk fingu eitt sindur av arbeiði hjá kommununi.
- Kommunan kann seta kommunalt arbeiði íverk t.d.uppá kloakkir, drekkivatn, skúlar,vegir, útstykkingar o.a.
- Kommunan kann seta leigugjaldið niður uppá kommunal grundøkir og bátahyljapláss.
- Kommunan er ikki noydd til, at hækka barnaansingargjaldið, tað kann standa í stað og enntá lækka.
- Kommunan kann gera bátahyl eystanfyri nýggju samferðsluhavnina og vinnuøki klár.
- osv

Hetta kemur sjálvsagt at kosta, men tað gevur arbeiði og harvið skattainntøkur, so í síðsta enda kann tað enntá geva vinning í kommunukassan.

# Hestfólk á veg inn í framtíðina

**Heðin Mortensen**
*býráðslimur*



VAL04

Frá á nýggjárinum verður Hestur partur av Tórshavnar kommunu, og helst er tað við blandaðum kenslum at onkur sigur síni gomlu kommunu farvæl, fyri at innlimast inn í størri kommunu. Tað er eisini vælskiljandi, samstundis sum eingin ivi er um, at hestfólk við samanleggingini hava valt framtíðina.

Sjálvur eri eg sannførdur um, at hestfólk við samanleggingini gera nakað av tí, sum danski heimsspekingurin Søren Kierkegaard einastaðni tosar um: »At tora er at missa fótafestið í eina løtu, ikki at trúgva er at missa seg sjálvan«.

Eg ivist ikki í, at onkur spyr seg sjálvan, um bygdin nú er slept upp á fjall og fer at hvørva í tí stóra meldrinum í høvuðsstaðnum. Men einki er skeivari enn tað, tí við samanleggingini fær Hestur eitt hav av møguleikum, ið bara skulu brúkast.

Tórshavnar kommuna hevur bundið seg at tryggja hestfólki somu tænastur og somu møguleikar, sum allir aðrir borgarar í kommununi hava. Harumframt eru fleiri ítøkilig mál greitt avtalað undir samráðingunum, sum veruliga staðfestu, at hestfólk hava dirvi at hyggja frameftir.

**Batar og loysnir**
Eitt mál, ið øll bygdin kann fáa stóra gleði av, er svimjihøllin, sum nú skal skipast eftir sama leisti sum tey býlingshúsini, vit frammanundan kenna frá Havnini. Umframt at vera bygdastova, ið gevur møguleika fyri alskyns virksemi um veturin, verður svimjihøllin opin um summarið, frá mai til september.

Av loystum málum kunnu nevnast flótibrúgvin og asfalteringin av keiøkinum. Men meira er á veg, tí farast skal undir garð rundan um kirkjugarðin, lendi til framtíðar kommunal áhugamál og ikki minst eitt spælipláss og fótbóltsvøll, ið kann fáa almikið at týða fyri trivnaðin hjá yngra og yngsta ættarliðnum í Hesti.

Skúlin skal gerast tíðarhóskandi, og somuleiðis eru settir pengar av til asfaltering av øllum bygdarvegnum, umframt at kloakk skal gerast í allari bygdini, so tær umstøðurnar verða nøktandi og góðar fyri umhvørvið. Hetta er alt nakað, øll bygdin fær gleði av.

Umstøðurnar hjá eldri at hittast og stytta sær stundir saman skulu gerast í Hesti. Møguliga eigur eisini at verða hugsað um sambýli til tey eldru, so tey sleppa undan at fara av oynni, tá tey kanska ikki longur klára seg heima. Hetta krevur ein miðvísan eldrapolitikk, nú eldraøkið er stóra avbjóðingin hjá Tórshavnar kommunu í hesum komandi valskeiðnum.

**Vinnumøguleikar**
Skal hyggjast frameftir, so er tað av størsta týdningi, at skaptir verða møguleikar fyri smærri vinnu í bygdini, nú eitt nú umstøðurnar á keiøkinum eru blivnar so nógv betri. Her er tað bara hugflogið, ið setir markið, men kommunan eigur at hava ein virknan leiklut, ið skundar undir og stuðlar vinnuligum virksemi í Hesti.

Eg vil fegin virka fyri, at hildið verður fram við tí arbeiði, ið er sett í gongd, so Hestur á ongan hátt verður eftirbátur, men tvørturímóti verður ein partur av stóru kommununi, ið hevur lætta atgongd til somu rættindi, tænastur og møguleikar, sum allir aðrir borgarar í Tórshavnar kommunu.